# Normek í Gøtu fingið ISO-9001-góðkenning

**Smiðjan, P/F Normek í Norðragøtu, er nú ISO 9001-góðkend, og altjóða góðkenningin fevnir um alla fyritøkuna. Hósdagin var móttøka í smiðjuni, har felagið alment fekk handað góðkenningarskjalið frá Det Norske Veritas**

GÓÐKENNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stjórarnir aftanfyri P/F Normek í Norðragøtu, Johnny Nón og Robert Langgaard, eru væl nøgdir við móttøkuna, sum skipað varð fyri í smiðjuni mikudagin. Eini 50 fólk umboðandi vinnuna, viðskiftafólk, bankar og starvsfólk vóru samankomin at heilsa fyritøkuni í samband við, at hon nú hevur fingið altjóða góðkenningina, ISO 9001:2000, sum hon verður rópt.

Tað var í august í fjør, at smiðjan fekk hesa góðkenning, men dagurin varð ikki alment »markeraður« fyrr enn nú mikudagin.

Tað er DNV, Det Norske Veritas, sum sertifiserar góðkenningina, sum tað eitur á fakmáli, og vegna DNV var tað Andrass Joensen, sum handaði teimum báðum stjórunum, Roberti og Johnny, góðkenningarskjalið í rammu.

Oljufelagið Agip, sum í dag eitur ENI, hevur stuðlað Normek fíggjarliga við góðkenningini, og í hesum sambandi segði Ólavur Gregersen nøkur orð við móttøkuna.

Sp/f Virkisráðgevingin í Saltangará hevur leitt fyritøkuna í Norðragøtu fram til hesa góðkenning, sum hevur stóran týdning í altjóða virksemi.



*Hetta skjalið er prógvið sum sigur, at P/F Normek í Norðragøtu nú er ISO-9001: 2000 góðkent sum virki – frá a til z. Á myndini, tv.: Johnny Nón, stjóri, Andrass Joensen, Det Norske Veritas og Robert Langgaard, umsitingarligur stjóri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Altjóða vørumerki

Robert Langgaard sigur, at felagið hevði neyvan rokkið hesi góðkenning, um ikki Sp/f Virkisráðgeving hevði leitt teir fram á mál, tí hetta er eitt øki, sum er fremmant hjá einum vanligum føroyskum arbeiðsplássi.

– Tú veitst ikki, hvat tað er, tú fert í holt við, um tú ikki hevur holla ráðgeving aftanfyri eina slíka ætlan, sigur stjórin.

Hann sigur, at ein slík góðkenning er eitt neyðugt vørumerki, tá ið hugsast skal um virksemi úti í heimi – og ikki minst sum veitarar í oljuvinnuni, ið felagið serliga hugsar um í hesum sambandi.

– Høvuðsorsøkin til, at vit fóru í gongd við at fáa smiðjuna ISO-9001-góðkenda, liggur í, at Normek ynskir at hava eitt høgt tænastustøði, sum støðugt leggur dent á tey krøv, sum okkara viðskiftafólki seta – og tey krøv, sum vit seta okkum sjálvi, sigur Robert.

Á Normek tekur Johnny Nón sær serliga av teimum praktisku viðurskiftunum, meðan Robert Langgaard tekur sær av tí umsiti-ngarliga partinum.

ISO 9001: 2000-góðkenningin, sum P/F Normek nú hevur fingið, fevnir sum nevnt um alla fyritøkuna – heilt frá tí, at felagið fær ein fyrispurning, til arbeiði er liðugt og avhendað.

# Umvælir og viðlíkaheldur skip, bátar og lastbilar

**20 fólk eru í starvi hjá smiðjuni, P/F Normek í Norðragøtu**

SMIÐJUVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

P/F Normek í Norðragøtu er stovnað í januar í 1997.

Høvuðsarbeiðið hjá smiðjuni fevnir í fyrsta lagi um umvælingar og viðlíkahald umborð á skipum og bátum og umvælingar og viðlíkahald av lastbilum.

Felagið hevur eisini havt ein leiklut í alivinnuni, har teir hava framleitt dregg til aliringar. Henda framleiðsla hevur verið í samstarvi við P/F Vónina.

Saman við trimum øðrum fyritøkum hevur Normek stovnað eitt felag, sum kallast ENSK Sp/f. Hetta felag hevur til endamáls at kunna bjóða út stór og fjølbroytt arbeiðir innan eitt nú el, mekanik, hydraulik og sandblásing.

Normek er eisini umboð fyri SAWO í Danmark, sum selir teir vælumtóktu HIAB-kranarnar, sum bæði verða nýttir á landi og sjógvi.



*Eini 20 fólk arbeiða hjá P/F Normek í Norðragøtu. Umframt umvælingar og viðlíkahald av skipum og bátum, umvælir smiðjan eisini lastbilar. Fyritøkan umboðar eisini kranar og annað úr útlandinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Oljuvinna

Eins og aðrar fyritøkur, sum starvast innan smiðjuvirksemi, hevur Normek eisini fyrireikað seg til eina komandi oljuvinnu í Føroyum. Felagið hevur havt fólk í Aberdeen í Skotlandi, har hesi hava luttikið á skeiðum, soleiðis at tey eitt nú kunnu átaka sær uppgávur úti á einum boripalli.

ISO-9001-góðkenningin er eitt stig á hesi leiðini.

Í dag eru eini 20 fólk í starvi hjá Normek.

Við seinastu útbyggingini av smiðjuni, gjørdust møguleikarnir á verkstaðnum nógv betri, og kann felagið í dag átaka sær at kalla allar stórar umvælingar – undir taki.

### OHSAS 18001

P/F Normek hevur eisini bygt upp eina skjalprógvaða skipan fyri heilsu, trygd og umhvørvi. Henda skipanin er bygd upp í tráð við krøvini í OHSAS 18001-standardinum, sum tað eitur. Hetta merkir, at fyritøkan leggur dent á arbeiðsviðurskiftini og støðugt arbeiðir við at menna hesi.

# Skermurin tikin av maskinuni

**Arbeiðseftirlitið hevur staðfest, at ein skermur var tikin av farsmaskinuni hjá FK í Hoyvík, tá ið ein genta skar seg í fingrarnar**

ARBEIÐSSKAÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikukvøldið frættist, at ein genta, sum er í starvi hjá FK í Hoyvík, hevði skorið seg í nakrar fingrar, tá ið hon stóð við eina maskinu í keypssamtøkuni.

Karl Joensen, leiðari á Arbeiðseftirlitinum, sigur, at stovnurin fekk fráboðan um hendingina mikudagin um 16.30-tíðina, og ein maður varð sendur niðan at kanna tilburðin.

### Eingin skermur

Hann sigur, at maskinan, sum gentan hevði staðið við, er ein maskina, sum melir kjøtfars til portiónir.

– Vit hava staðfest, at sambært tekningunum skuldi maskinan havt ein skerm, men hesin skermur varð ikki á maskinuni, tá ið tilburðurin fór fram.

Karl sigur, at skaðin hevði ikki verið hendur, um maskinan var brúkt, sum hon sambært tekningunum eigur at brúkast.

### Møgulig ákæra

– Enn eru kanningarnar ikki lidnar, og enn hava vit ikki tikið støðu til, um vit fara at heita á fútan um at reisa ákæru móti fyritøkuni, sigur Karl Joensen.

Sum skilst, hevur gentan skorið seg í nakrar fingrar, men skaðin er tíbetur ikki størri enn so, at hon kann sleppa uttan varandi mein, um alt lagar seg væl.